# B68 rennur aftaná



**HANGA Í**

*Umráðandi er hjá toftamonnum at vinna heimadystin móti Víkingi, um teir ynskja at fylgja við oddinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDINI** Um B68 ikki vinnur heimadystin móti Víkingi um vikuskiftið, missa toftamenn so at siga sambandið við oddan fyribils

Uni Holm Johannesen

Tveir sigrar á heimavølli. Og tvey tap á útivølli.

Tað er úrtøkan hjá B68 higartil. Tey seks stigini røkka í løtuni til eitt fjórða pláss, sum eru fýra færri enn oddaliðið B36.

Sunnudagin fær B68 vitjan av Víkingi. Kravið hjá toftamonnum er trý stig, um teir fyribils ikki skulu missa sambandið við oddan.

B68 hevur staðið seg væl á heimavølli. Liðið hevur vunnið á B71 og ÍF á Svangaskarði, men tapt móti B36 og FC Suðuroy á útivølli. Hagtølini tala kanska fyri, at B68 vinnur um vikuskiftið.

Víkingur hevur víst meira støðufesti, tá tað ræður um stig. Liðið er framvegis ósigrað, men hevur spælt tveir javnleikir – á heimavølli móti HB og Víkingi. Víkingur hevur í løtum víst, at teir eru ikki stórspælandi. Verjuspælið hevur ikki verið heilt nøktandi, og teir hava latið fimm mál ígjøgnum í fyrstu fýra landskappingardystunum.

So er spurningurin, hvussu Víkingur ætlar at verja fyri toftamonnum, sum higartil hava skotið sjey mál.

Jógvan Martin Olsen kann seta liðið sum honum lystir, tí hann hevur allar mans tøkar til dystin. Tað kundi Bill Mc. Jacobsen, venjari hjá B68, eisini, seinastu vit frættu av Toftum. Dysturin verður leiktur mánakvøldið.

uni@sosialurin.fo

NING · Tel 526464

UV

UMHVØRVISVIKAN
10.-16. MAI 2010

ÁIN,
VÁGIN&
FJØRAN

Les meira um øll tiltøkini
á umhvørvisvikuni 2010 á
www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA